## Sponsk innrás

Reiðaríið hjá spanska ferðamannaskipinum Grand Mistral hevur boðað íslendingum frá, at skipið kemur til Reykjavíkar tvær ferðir í summar, og at umleið 1.800 fólk verða við hvørja ferð. Sagt verður, at ferðafólkini koma við flogfari úr Spania til Íslands. Har fara tey umborð á skipið, sum síðani fer til Grønlands á rundferð. Úr Grønlandi kemur skipið aftur til Íslands og tekur onnur ferðafólk umborð og heldur leiðina fram til Evropa. Grand Mistral er knappliga 50.000 tons stórt og tekur umleið 1.200 ferðafólk.



## Vilja hava kreppugrunn

Stjórnirnar í Týsklandi og Fraklandi ætla sær at stovna ein evropeiskan gjaldoyragrunn eftir sama leisti sum Altjóða Gjaldoyragrunnurin IMF. Uppgávan hjá tí nýggja grunninum verður at hjálpa londum, sum brúka evruna sum gjaldoyra, og sum koma í búskaparliga kreppu. Harafturat skal grunnurin styrkja gjaldoyrasamstarvið í Evropa. Hugskotið hevur sín uppruna í teirri sera álvarssomu búsksparkreppuni í Grikkalandi. 16 lond hava evruna sum gjaldoyra, men Týskland vil hava øll tey 27 ES-londini at taka undir við hugskotinum um grunnin.

# Vilja ikki lata stuðul til fleiri arbeiðspláss

**Uppskotið frá Miðflokkinum um at lata almennan stuðul til at innflyta frystan fisk fyri at útvega arbeiði á føroyskum fiskavirkjum, eigur ongan góðan**

ARBEIÐSPLÁSS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Tað verður av ongum, at almennur stuðul fer at vera latin til at innflyta frystan fisk til føroysk fiskavirki at arbeiða.

Tað er greitt, nú Løgtingið fyrsta dagin skal taka støðu til hendan spurningin.

Miðflokkurin hevur annars skotið upp at lata 7,5 milliónir í stuðuli til føroysk virki at at innflyta frystan fisk fyri at útvega fleiri arbeiðspláss á flakavirkjunum.

Hetta er eitt uppskot, sum arbeiðarafeløgini staðiliga mæltu til at taka undir við og umboð fyri fiskavirki metti somuleiðis, at tað var ein gongd leið,

Í Vinnuhúsinum vóru tey meiri ivingarstom, tí tey eru ímóti almennum stuðuli til vinnuna, men skuldi hetta koma upp á tal, mátti í mesta lagi verða talan um eina fyribils loysn.

Men nú vinnunevndin hjá Løgtinginum hevur viðgjørt uppskotið, er greitt, at tað fær onga undirtøku, heldur ikki sum ein fyribils loysn.

Ein stórur meiriluti í nevndini, sum umfatar allar samgonguflokkarnar og Tjóðveldi, sigur, at framleiðarar hava víst á, at skal farast undir slíka framleiðslu, er talan um eina tilgongd, sum er bæði drúgv og torfør.

Harafturat skal dýr tiðningarútgerð útvegast og marknaður skal finnast. Somuleiðis er talan um framleiðslu, sum bindur sera nógv gjaldføri.

- Fyri at gera søluavtalur á marknaðinum er neyðugt, at virkini kunnu tryggja keyparum sína vøru í fleiri ár, og uttan at stígur kemur í.

Meirilutin í vinnunevndin sigur, at enntá eitt virkið, sum hevur røttu útgerðina, helt hetta er ikki nakað tey fóru at kasta seg yvir, í øllum førum ikki í ár.

Men ein avgerandi spurningur er eisini um tað at stuðla innflutningi av frystum fiski, hevði verið kappingaravlagandi og um tað hevði trýst avreiðingarprísin hjá føroyskum skipum niður.

Meirilutin í vinnunevndini skilur, at arbeiðarafeløgini taka undir við hesum, tí arbeiðsloysið er so stórt

- Men vinnan hevur púra greitt víst á, at verður hetta bara galdandi eitt stutt tíðarskeið, hevur tað ongan áhuga.

- Eingin fer undir at byggja eina framleiðslu upp, sum einans ber seg við studningi, fæst ikki vissa fyri, at studningurin verður verandi í fleiri ár.

- Vit tosa sostatt um eina meira ella minni varandi stuðulsskipan, sigur vinnunevndin.

Kári P. Højgaard er einsamallur í vinnunevndini um at taka undir við uppskotinum.

Hann sigur, at ein høvuðstrupulleiki í føroysku fiskivinnuframleiðsluni er, at rávørutilgongdin er ójøvn og svingar ímillum 80 og 120 túsund tons um árið.

- Manglandi rávørutilgongdin saman við umleggingum, rasjonaliseringum og effektiviseringum hevur viðført, at nøkur flakavirkir kring landið hava latið aftur, hetta gongur sjálvsagt út yvir inntøkugrundarlagið hjá flakafólkunum.

Hann heldur ikki, at nøkur orsøk er til at síggja ræðumyndir frá studingsskipanum í áttatðarunum fyri sær, tí kemur gongd ikkia framleiðsluna, verður heldur ongin studningur útgoldin.

- Tað ringasta, sum kann henda, er, at vit fáa ein hóp av langtíðar arbeiðsleysum, sigur Kári P. Højgaard.

# Sleppa framvegis ikki at bryggja sterkt í Føroyum

**Heldur ikki hesuferð eydnast at fáa politisku undirtøku fyri at geva loyvi til at bryggja sterkt í Føroyum**

RÚSDREKKALÓG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Samgongan tekur ikki undir við, at tað skal verða loyvt at bryggja sterkt í Føroyum.

Tjóðveldi og Kári á Rógvi úr Sjálvstýrisflokkinum hava skotið upp at avtaka hámarkið fyri, hvussu sterkan løg tað skal verða loyvt at bryggja og selja í Føroyum.

Í løtuni er hámarkið 5,8% og tey, sum settu uppskotið fram, meta, at hetta er at gea mismun á føroyskari og útlendskari vinnu, tí tað er loyvt at innflyta løg, sum er sterkari.

Men nú uppskotið hevur verið til viðgerðar í vinnunevndini, er samgongan púra avgjørd og boðar stutt frá, at tey taka ikki undir við uppskotinum og mæla Løgtinginum frá at samtykkja tað.

Ein orsøk til tað kann vera, at ávísir samgongutinglimir við Jógvani á Lakjuni á odda, høvdu hug at gera hetta til eitt samgongumál og hava kravt, at samgongan vísir málinum frá sær.

Bjørt Samuelsen, sum er í minniluta í vinnunevndini, mælir til at samtykkja uppskotið fyri at taka mismunin á føroyskum og útlendskum bryggjaríum burtur og fyri at geva eini føroyskari vinnu høvið til at mennast.

Men vil samgongan hava betri stundir at seta tiltøk í verk, eitt nú heilsupolitisk átøk, ella vil samgongan gera avgjaldsbroytingar ella annað, er hon sinnað at útseta gildiskomuna í nakrar mánaðir.

Ein annar minniluti, Kári P. Højgaard, tekur ikki undir við uppskotinum.

Hann vísir á, at tað er avvarðandi landsstýrisfólk sum hevur høvuðsábyrgdina av málsøkinum og tí eiga broytingar í rúsdrekkalógini at koma haðani og eiga ikki at verða tiknar úr hondunum á landsstýrismanninum.